# GERÐABÓK

**Dato:** **16. desember 2010** **kl. 17.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:191/10-210/10**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Maria H. Olsen
Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**LUTTÓKU EISINI:**
Jákup E. Hansen
Jóan Petur Hentze
Bjørgfríð Ludvig

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.40

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**194/10** **2010-0177**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 16. desember 2010:** Tikið til eftirtektar.

**195/10** **2010-2663**

**Leigutraðir, urtagarðsstykkir o.a.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Kommunan leigar út umleið 100 traðir og 35 urtagarðsstykkir umframt økir til hallir og hús hjá ymsum felagsskapum. Eisini eru inntøkur av brúksrættindum av smærri økjum og geirum.

Í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2010 var roknað við, at leigugjøldini skulu endurskoðast.

Málið um dagføring av leigugjøldunum er ikki liðugt avgreitt.

Í fíggjarætlanin fyri 2010 er roknað við eini netto inntøku uppá kr. 365.000. Fyrstu 10 mðr. eru netto inntøkurnar kr. 106.000. Fyri alt árið verða tær mettar til kr. 80.000. t.v.s. ein minni inntøka uppá kr. 285.000.

**Fíggjarnevndin 17.november 2010:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at játta 85.000 kr. av konto 20910 og at mæla býráðnum til at flyta kr. 200.000 av konto 1560, tænastumannaeftirlønir, á konto 6111.

**Býráðið 16. desember 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**196/10** **2010-2356**

**Reglugerð fyri rottutýning**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Heilsu- og umhvørvisdeildin hevur gjørt reglugerð fyri rottutýning í Tórshavnar kommunu (j.nr. 2010-2356/1). Reglugerðin lýsir skyldur hjá borgaranum og kommunu og hvussu farast skal fram, tá boðað verður frá rottu. Í reglugerðini verður lagdur dentur á at skráseta viðurskifti í sambandi við rottutýning og fyribyrging av rottu, m.a. til hagtalsbrúk.

Umsitingin leggur reglugerðina fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til at tikið verður undir við reglugerðini.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 26. oktober 2010:** Vivie Kirke Davidsen frá heilsu- og umhvørvisdeildini kunnaði um málið. Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**197/10** **2006-3482**

**Útstykking, matr. nr. 135a og 32a, Argir, umsókn frá Paula Dam vegna eigararnar Malla Dam o.fl.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsókn er komin frá Paula Dam, dagfest 15. juli 2009, sum vegna eigararnar av matr. nr. 135a Mallu Dam, Kjartan Dam Joensen og Paula Dam Joensen og eigaran av matr. nr. 32a Hans Petur Dánjal Dam, søkir um loyvi at útstykkja ognina matr. nr. 135 og 32a, á Argjum.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í A1 í 3. grundumráði.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Matr. nr. 135a er 7.078 m² til víddar.
Matr. nr. 32a er 7.557 m² til víddar.

Ætlanin er at býta stykkini sundur, soleiðis at tað verða 13 grundstykkir til sethús sum eru 500-656 m², umframt verandi hús. Tvey grundstykkir á 1690 og 1673 m² sum hvør sæar hava 4 raðhús. Harumframt verður parkering og fríøki.

Innkoyring verður frá Garðsgøtu.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarligt:**
Onga fíggjarliga binding fyri kommununa.

**Skjøl:**
Umsókn j.nr. 2006-3482/12
Reviderað tekning j.nr. 2006-3482/16

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin, í samráð við umsøkjaran, ger uppskot til serstaka byggisamtykt, at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur í samráði við umsøkjaran gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið.
Talan er um eina útstykking uml. 17.300m² til støddar í einum øki, sum liggur í umráðisparti A1 í 3. grundumráði, og umfatar matr. nr. 32a, 135a, 135e og 135f, Argir.
Útstykkingin umfatar 13 grundstykkir til stakhús og 2 grundstykkir til tvíhús, umframt 2 grundstykkir hvørt til 4 samanbygd hús, eitt fríøki umframt felags parkeringspláss.
Tvey av grundstykkjunum til stakhús eru ábygd.
Vegatgongdin verður frá Garðsgøtu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini at góðtaka uppskotið til serstaka byggisamtykt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. november 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Eisini samtykti nevndin, at tá ið útstykkingin er liðug og góðkend, skal kommunan yvirtaka vegir og felagsøki uttan kostna fyri kommununa.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**198/10** **2010-0303**

**Umsókn frá SEV um lendi og byggiloyvi til nýggja transformarastøð í Havnadali, tætt við vatnbyrgingina.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
SEV heitir í umsókn á Tórshavnar kommunu um at útvega teimum lendi burtur av matr. nr. 1160a, Flatnahagi, ið Tórshavnar kommunu eigur, til at byggja nýggja transformarastøð á. Sev ætlar at leggja háspenningslinjuna í Havnadali um til kaðal, og verður verandi stáltorn tikið burtur og nýggj støð bygd. á 2x2 m. Tann nýggja transformarastøðin skal veita streym til tað nýggja vatnverkið úti í Havnadali. Lendið í søkt verður um er 31,85 $m^2$ til støddar.
SEV søkir samstundis um byggiloyvi til nýggja transformarastøð, sambært innsendu tekning.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í C1 í 3. grundumráði. Ásetingar fyri umráðispartin eru: Umráðispartarnir verða í síni heild lagdir til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt. Útstykking innan teir einstøku umráðispartarnar verður einans loyvd, um hon hóskar við heildarbyggiskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri umráðispartin. Byggistigið má ikki fara upp um 0,4 og nettonýtslustigið má ikki fara upp um 0,5.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Kommunan hevur skyldu at ávísa SEV øki til transformarastøðir. Grein 10 í viðtøkunum fyri Elfelagið SEV er soljóðandi: "Hvør limakommuna letur innanfyri kommunumark felagnum ókeypis til handa ta vídd, íð tørvar til háspennings- og lágspenningsleiðingar, transformarastøðir og til vegir til støðirnar".

Kommunan og SEV hava avtalað hvussu traformarahúsini hjá SEV skulu síggja út, hetta er víst á tekningum sum SEV hevur latið kommununi, okkara j.nr. 2009-1766/1.
Havi tosað við Tóra í Hoyvík og Viggo Christiansen um staðsetingina av transformarastøðini og er tað sambært teimum í lagi.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Kommunan skal ávísa SEV øki til transformatorstøð.

**Skjøl til fundin:**

Nýggj staðseting j.nr. 2010-0303/3
Yvirlitskort j.nr. 2010-0303/4

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin góðtekur staðsetingina av nýggju transformarahúsinum og at byggiloyvi verður útskrivað tá ið avtala er gjørd við eigaran um lendið, og at útsjónd av bygninginum verður sambært avtalu millum SEV og kommununa, jbr. j.nr. 2009-1766/1. Eisini verður mælt til at beina málið í fíggjarnevndina til víðari avgreiðslu av lendinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at gera langtíðarleigusáttmála við SEV.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**199/10** **<u>2010-0338</u>**

**<u>Dýping av Tórshavnar havn suður úr Tinganesi.</u>**

Í skrivi til Tórshavnar havn, dagfest 5. apríl 2006, heitir Strandfaraskip Landsins á Tórshavnar havn, um at virka fyri at dýpa økið suður úr Tinganesi. Saman við áheitanini er ein frágreiðing frá skiparunum á Smyrli og Norrønu. Í frágreiðingini frá skiparunum verður víst á, at um tað grunna suður úr Tinganesi verður dýpt, gerðst tað munandi tryggari hjá skipunum at koma inn í havnina, tí tá passa skipini millum Tinganes og molan, uttan at vandi er fyri at tey taka botn.

Tórshavnar havn hevur áður víst á, at havnin hevði verið munandi tryggari, um tað grunna suður úr Tinganesi bleiv dýpt, og kunnu tí taka undir við ynskinum hjá skiparunum

Av tí at økið liggur so nær fornminnunum í Tinganesi, hevur tað verið tætt samskifti við Fornminnisnevndina, um loyvi til at dýpa.

Fyri at tryggja fornminnini í Tinganesi, hevur landsstýriskvinnan í mentamálum avgjørt at friða umliggjandi øki kring Tinganes. Friðingin forðar ikki fyri at tað verður dýpt, men hetta skal gerast í samráð við Fornminnisnevndina.

Dýpingin snýr seg um eitt umleið 3.800 $m^2$ stórt øki, sum er mett at kosta 6 mió.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at seta ætlanina í verk, at fíggja av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn fyri 2010.

**Havnarnevndin 15. februar 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at gera byggiprogram.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og gera byggiprogram.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

Byggiprogram er gjørt.

Úrdrag úr byggiprogramminum:
- Leiðbeiningin frá Oricia, sum eru serfrøðingar í spreinging, skulu fylgjast.
- Treytir frá Føroya Fornminnissavni, skulu fylgjast.
- Øki sum skal dýpast- spreingjast 3.200 $m^2$
- Øki sum skal dýpast - bleytur botnur 600 $m^2$
- Kostnaðarmeting 6. mió.

Ætlanin er, at arbeiðið skal vera liðugt ultimo november 2010.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til:
- at taka undir við byggiprogramminum
- at játta kr. 150.000,- til projektering av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2010.

**Havnarnevndin 12. apríl 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og taka undir við byggiprogramminum og játta kr. 150.000,- til projektering av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2010.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt.

Endaligt loyvi er fingið frá Fornminnisnevndini, og arbeiðið er boðið út í innbodnari licitatión til J&K Petersen og Articon, tí hesar fyritøkurnar vóru mettar at vera tær einastu fyritøkurnar, sum vóru í Føroyum og høvdu tær neyðugu royndirnar.
Licitatiónin verður tann 26. november 2010.
Eftirfylgjandi hevur E. Pihl & Søn ynskt at sleppa at bjóða.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til, eisini at lova E.Pihl & Søn at bjóða upp á arbeiðið.

**Havnarnevndin 15. November 2010:** Hildið verður fast við, at arbeiðið bert verður boðið út til Articon og J&K Petersen.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari licitatión, sum varð hildin tann 26. November:

| | |
|---|---|
| Articon | kr. 3.650.000,- |
| J&K Petersen | kr. 7.340.334,- |

Kostnaður fyri projektering, trygging, príshækkingar og óvantað er mettur til kr. 720.000,-

LBF kann standa fyri byggileiðslu og fakeftirliti fyri kr. 350.000,-

Í tilmælinum frá LBF, verður mælt til at taka av lægsta tilboðnum frá Articon upp á kr. 3.650.000,-

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum frá Articon upp á kr. 3.650.000
At taka av tilboðnum frá LBF at standa fyri byggileiðslu og fakeftirliti fyri kr. 350.000,-
At avseta kr. 720.000 til projektering, trygging, príshækkingar og óvantað.
At játta kr. 4.720.000,- av íløguætlanini fyri Tórshavnar havn 2010/2011 til endaliga liðugtgerð av arbeiðinum.

**Havnarnevndin 6. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og taka av lægsta tilboðnum frá Articon upp á kr. 3.650.000
- at taka av tilboðnum frá LBF at standa fyri byggileiðslu og fakeftirliti fyri kr. 350.000,-
- at avseta kr. 720.000 til projektering, trygging, príshækkingar og óvantað.
- at játta kr. 4.720.000,- av íløguætlanini fyri Tórshavnar havn 2010/2011 til endaliga liðugtgerð av arbeiðinum.

## Ískoyti:
Í samráðingunum um arbeiðssáttmála er tað komið fram, at nøgdirnar, í føstum máti, ikki eru 4.000 $m^3$, men 9.281 $m^3$, og víddin er ikki 3.800 $m^2$, men 4.266 $m^2$. Hetta merkir, at oman á tilboðið frá Articon, sum var kr. 3.650.000,-, er nú komið kr. 1.529.000,- , tá er hædd tikin fyri øllum óvæntaðum útreiðslum, og prís og lønarvøkstri.
Hetta merkir, at samlaða játtanin má hækkast við kr 1,129 mió.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum frá Articon upp á kr. 3.650.000
- at taka av tilboðnum frá LBF at standa fyri byggileiðslu og fakeftirliti fyri kr. 350.000,-
- at avseta kr. 320.000 til projektering, trygging, o.a
- at gjalda kr.1.529.000,- fyri meira nøgdir og príshækkingar.

at játta kr. 5.849.000,- av íløguætlanini fyri Tórshavnar havn 2010/2011 til endaliga liðugtgerð av arbeiðinum.

**Havnarnevndin 14. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. desember 2010:** Mælt verður býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og taka av lægsta tilboðnum frá Articon upp á kr. 3.650.000
at taka av tilboðnum frá LBF at standa fyri byggileiðslu og fakeftirliti fyri kr. 350.000,-
at avseta kr. 320.000 til projektering, trygging, o.a
at gjalda kr.1.529.000,- fyri meira nøgdir og príshækkingar.
at játta kr. 5.849.000,- av íløguætlanini fyri Tórshavnar havn 2010/2011 til endaliga liðugtgerð av arbeiðinum.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**200/10** **2010-2717**

**Yvirlit yvir lidnar verkætlanir og aðrar verkætlanir – um at gera upp og loka**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við viðgerina av fíggjarætlanini fyri 2011 (j. nr. 2010-0547), legði borgarstjórin á býráðsfundi hin 11. nov. 2010 fram yvirlit yvir lidnar og aðrar verkætlanir (j. nr. 2010-2717/1), – ið heitt verður á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka og síðani at leggja fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein meiriluti í býráðnum samtykti at taka undir við at heita á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka slíkar verkætlanir.

Á tekniska økinum er talan um niðanfyristandandi verkætlanir at gera upp og loka:

| § 6 | Teknisk mál fríðkan | | | | | Nevnd |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Saldo lidnar verkætlanir | 1.503 | | | BB |
| | 6275 | Kamping | 518 | | | BB |
| | 6275 | Sølupláss í Vágsbotni | 462 | | | HU |
| | | *Kongabrúgvin* | | 1.000 | | BB |
| | | *Torg við Perluna og Reinsarí'ið* | | 300 | | BB |
| | | *Søluplássið í Vágsbotni* | | 183 | | HU |
| | | *Vaglið* | | 1.000 | | BB |
| | | Nýggj saldo | | | - | |

| § 6 | Teknisk mál Kirjugarðar og vegir | | | | | Nevnd |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Saldo lidnar verkætlanir | 2.126 | | | TN |
| | | *Viðskiftahús í Kirkjubø* | | 1.000 | | TN |
| | | *Frílendi til borgaran* | | 226 | | TN |
| | | *Glyvursvegur við brúgv* | | 400 | | TN |
| | | *Ferðslutrygdarætlan* | | 500 | | TN |
| | | Nýggj saldo | | | - | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við at loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. november 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
Marin Katrina Frýdal og Jan Christiansen vóru ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.
Levi Mørk var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**201/10** **2010-2717**

**Yvirlit yvir lidnar verkætlanir og aðrar verkætlanir – um at gera upp og loka**

**Málslýsing - samandráttur**
Í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2011 (j. nr. 2010-0547), legði borgarstjórin á býráðsfundi hin 11. nov. 2010 fram yvirlit yvir lidnar og aðrar verkætlanir (j. nr. 2010-2717/1), – ið heitt verður á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka og síðani at leggja fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina uppskot um at nýta avlopið til nýggjar verkætlanir sbr. skjali um uppgerð yvir lidnar verkætlanir og nýggjar verkætlanir.

Ein meiriluti í býráðnum samtykti at taka undir við at heita á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka slíkar verkætlanir.

Á trivnaðarøkinum er talan um niðanfyri standandi verkætlanir at gera upp og loka:

| | | | | Nýggjar verk. | Saldo |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 2** | **Almanna- og heilsumál** | | | | |
| 2775 | Saldo lidnar verkætlanir | 488 | | | |
| 2275 | Nýggj læknahøli | 250 | | | |
| 2775 | Vardar íbúðir | 1.015 | | | |
| 2775 | Røktarheim yvir við strond | 1.064 | | | |
| | *Køkur Ellisheim* | | | 1.850 | |
| | *Kommunulæknaskipanin* | | | 950 | |
| | Nýggj Saldo | | | | 17 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við at loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Sosiala nevnd 7. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**202/10** **2010-2717**

**Yvirlit yvir lidnar verkætlanir og aðrar verkætlanir – um at gera upp og loka**

**Málslýsing - samandráttur**
Í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2011 (j. nr. 2010-0547), legði borgarstjórin á býráðsfundi hin 11. nov. 2010 fram yvirlit yvir lidnar og aðrar verkætlanir (j. nr. 2010-2717/1), – ið heitt verður á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka og síðani at leggja fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina uppskot um at nýta avlopið til nýggjar verkætlanir sbr. skjali um uppgerð yvir lidnar verkætlanir og nýggjar verkætlanir.

Ein meiriluti í býráðnum samtykti at taka undir við at heita á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka slíkar verkætlanir.

Á trivnaðarøkinum er talan um niðanfyri standandi verkætlanir at gera upp og loka:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 3** | **Børn og ung** | | | | |
| | | Saldo lidnar verkætlanir | - | | |
| | 3175 | Dagstovnur Hoyvíkshagi suður | 990 | | |
| | | Tórsvøllur | | 462 | |
| | | *Høllin í Kollafirði* | | | |
| | | Nýggj saldo | | | 528 |
| **§ 4** | **Undirvísing** | | | | |
| | | Saldo lidnar verkætlanir | 844 | | |
| | | *Svimjihylur hølir til svim.flg* | | 844 | |
| | | Nýggj saldo | | | - |
| **§ 5** | **Mentan og frítíð** | | | | |
| | | Saldo lidnar verkætlanir | 866 | | |
| | | *Tórsbreyt* | | 300 | |
| | | *Spælipláss Grasagarð* | | 150 | |
| | | *Svimjihylur nýggir plintar* | | 350 | |
| | | Nýggj saldo | | | 66 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við at loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti tó við teimum broytingum, at játtaðar verða í alt kr. 740.000 í stuðli til Dansifrøi (sí 2002-2686) av § 3 kr. 528.000, av § 4 kr. 146.000 og av § 5 kr. 66.000, og at játtanin til høli hjá Havnar Svimjifelag á § 4 lækkar sum avleiðing av hesum við kr. 146.000 til kr. 698.000. Saldo á øllum greinum verður eftir hetta kr. 0.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**203/10** **2002-2686**

**Umsókn um øki til Dansifrøi og stuðul til bygging**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um øki og loyvi til felagsbygging til 2 felags høli til Dansifrøi og Fimleikafelagið Ljósið.

Feløgini vísa á øki í Gundadali, ið er ogn hjá TK, og liggur sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, í umráðispartinum D2.

Hjálagt er:
Umsókn frá umsøkjaranum: j.nr. 200202686-2
Tekningar av skitsuprojekti: j.nr. 200202686-2
Kortskjal av økinum: j.nr. 200202686-3

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Dansifrøi hevur fyrr havt samband við umsitingina, har teir hava søkt um at fáa útvega økið, men hava ikki víst á nakað, sum umsitingin hevur mett verða gongd leið.

Umsitingin hevur havt samráðingar við fimleikafelagið í sambandi við, at teir upprunaliga søktu um einhvørja høll, av tí at teir høvdu stóran hølistørv. Í hesum sambandi vísti umsitingin tá á, at teir arbeiddu við einari ætlan úti í Marknagili, sum teir kundu gerast partur av.

Ætlanin bleiv síðani slept, og hevur umsøkjarin so vent sær aftur til TK við umsókn um at fáa ávíst eitt annað øki, nú saman við Dansifrøi.

Arkitekturin hevur verið á byggideildini og framlagt verkætlanina fyri býararkitektinum og hevur fingið at vita, at ymisk viðurskiftir uttanfyri, so sum parkering og ferðsla í sambandi við verkætlanina skulu endaliga viðgerast í samráð við umsitingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at lata umsøkjaranum økið at byggja verkætlanina á.

Samstundis verður mælt til, at álagt verður umsøkjaranum, at skipa soleiðis fyri, at parkering og onnur uttanumviðurskifti verða gjørd í samráð við umsitingina hjá TK.

Endaliga verður gjørt vart við, at endalig umsókn um byggiloyvi skal leggjast fyri nevndina aftur, tá ið allar tekningar og neyðug loyvi fyriliggja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2003:** Mikael Viderø, býararkitektur, kunnaði nevndina um felagsbygningin hjá Dansifrøi og Fimleikafelagnum Ljósinum.

Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini 29. september 2003 treytað av, at ungdómsdansur verður ein partur av verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 9. oktober 2003:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskip-anarnevndini og at taka upp samráðingar um økið.

**Ískoyti:**
Broyting er hend soleiðis, at fimleikafelagið Ljósið er farið úr verkætlanini. Felagið Dansifrøi er komið við broyttari verkætlan.

Nýggjar tekningar eru komnar frá Arkitektavirkinum Magnus Hansen.

Gólvvíddin er 840 $m^2$.

Mesta hædd á bygningi 9,5 m.

Tal av bilstøðlum 40, kravt tal av bilstøðlum 1 stk/50 $m^2$.

Av tí at enn ikki er avgjørt um grundøkið skal frámatrikulerast, ber ikki til at rokna byggistig ella nettonýtslustig.

Bygningurin liggur í økispartinum D2 ítróttarøki.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at broytta verkætlanin verður góðkend, og at umsóknin um byggiloyvi verður gingin á møti. Samstundis verður mælt til, at fíggjarnevndin viðger nýggju fíggjarligu viðurskiftini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005:** Samtykt at góðkenna broyttu verkætlanina og at ganga umsóknini um byggiloyvi á møti.

Samstundis verður spurningurin um tær nýggju fíggjarligu fyritreytirnar beindur í viðkomandi nevndir.

**Fíggjarnevndin 16. november 2005:** Umrøtt og verður tikið uppaftur, tá mentamálanevndin hevur viðgjørt málið.

Nýggj umsókn um stuðul.

Á fundi í mentamálanevndini 10. februar 2004 samtykti nevndin at játta 30% av kr. 16.500.000,00, sum býráðið á fundi 19. februar 2004 samtykti at taka undir við mentamálanevndini, sum sostatt fellur burtur nú nýggj umsókn er komin.

- Í nýggju umsóknini, dagfest 11. juli 2005, er kostnaðarmetingin kr. 7.600.000,00 tilsamans uttan MVG ella kr. 9.500.000,00 við MVG, og søkir Dansifrøi um øktan stuðul frá teimum 30% til 60% fyri at verkætlanin kann gerast veruleiki beinanvegin.

Við 30% kr. 2.850.000,00 og 60% kr. 5.700.000,00.
Mentamálanevndin 30. november 2005: Samtykt at játta 60% av kr. 9.500.000,00 svarandi til kr. 5.700.000,00 í stuðli av konto 64, og at leggja málið fyri býráðið, um fíggjarnevdina, til góðkenningar.

Eisini samtykt at heita á umsitingina um at gera avtalu um nýtslurætt til hølini til m.a. ungdómsdans og leggja avtaluna fyri nevndina til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Málið var umrøtt og samtykt í prinsippinum at taka undir við mentamálanevndini at veita 60% í stuðli, nú landið ikki stuðlar, við nærri treytum og at leggja málið fyri á næsta fundi.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at stuðla hallarbyggingina við 5,7 mió. kr. yvir 5 ár við trygd í ognini og avtalu um nýtslurætt og at leggja málið fyri mentamálanevndina og býráðið.

**Býráðið 26. januar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 8. februar 2006:** Samtykt at taka undir við uppskotinum um avtalu millum Tórshavnar kommunu og Dansifrøi um nýtslurætt til felagshúsið, j. nr. 2002-2686.

**Ískoyti:**
Í sambandi við býarskipanararbeiðið, sum fer fram av økinum í og kring Gundadal, vísandi til nógvu verkætlanirnar, sum bæði kommunan og felagsskapir hava staðsett í økinum, hevur umsitingin mett um staðsetingina av bygninginum hjá Dansifrøi.

Tá nevndin seinast viðgjørdi málið, í samband við prinsipiella tilsøgn um byggiloyvi, vóru munandi øðrvísi fortreytir at leggja til grund fyri støðutakanini til

staðseting í mun til aðrar byggingar í økinum. Her er tað serstakliga núverandi verkætlanin hjá grunninum Tórsvølli sum hevur við sær, at tað ikki kann metast ráðiligt at staðseta bygningina hjá Dansifrøi har sum upprunaliga skotið upp. Tættleikin millum báðar verkætlanirnar má metast at vera ov stórur, og kemur at treingja óneyðugt samanum.

Vísandi til at Tórshavnar kommuna eisini fer undir eina víðkan av høllini á Hálsi og atlitið til at Gundadalshøllin hevur framíhjárætt til lendi at víðka móti ætlaðu staðsetingini til Dansifrøi, má metast at økið fer at gerast ov trongt.

Umsitingin hevur tískil víst á aðra staðseting til bygningina hjá Dansifrøi. Sí kortskjal dagfest. 22.02.2007.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta bygningina hjá Dansifrøi sambært kortskjali dagfest. 22.02.2007, vísandi til at hetta er sera hóskandi øki, har verkætlanin vil kunna stuðla væl undir virkseminum og parkeringviðurskiftunum í sambandi við høllina á Hálsi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 22. februar 2007**: Málið útsett.

**Uppískoyti:**
Skriv er komið frá felagnum, har teir vísa at teir eru glaðir fyri staðsetingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 2. apríl 2007:** Ein meiriluti Jógvan Arge, Katrin Dahl Jakobsen og Bjarti Mohr samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen og Leivur Hansen mælir til at halda fast við upprunaligu staðsetingini av felagshúsi og varðveita geiran millum Ítróttarhøllina og R.C.Effersøesgøtu sum eitt grønt øki.

Harumframt samtykti nevndin at leggja avgerðina fyri býráðið.

**Býráðið 24. mai 2007:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Katrin Dahl Jakobsen, um at beina málið aftur í byggi og býarskipanarnevndina, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov og Annika Olsen.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Greiddu ikki atkvøðu: Heðin Mortensen, Hildur Eyðunsdóttir og Jógvan Arge.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen og Bjarti Mohr.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

At enda varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, og Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal og Katrin Dahl Jakobsen.

**Ískoyti:**
Dansifrøi hevur fingið byggiloyvi, dagfest 13. 12. 2007, journal nr. 2007-3092/44, og var arbeiðið byrjað. Tá bygningurin var liðugt stoyptur var staðfest, at bygt var ikki sambært byggiloyvinum, tí innrættingin var speglvend.

Arbeiðið var steðgað, og umsøkjarin er nú komin við nýggjari umsókn, sum er í samsvari við byggiloyvið, men nakað broytt. Tí er málið viðgjørt av nýggjum, og sent til teknisku deild hjá TK, og til Brunaumsjón Landsins.

**Viðmerkingar:**
Notat frá teknu deild liggur í málinum (j.nr. 2007-3092/48).
Samanumtikið er tekningstilfarið ikki egnað til viðgerð hjá teknisku fyrisitingini.

Tá greiðar, mátsettar tekningar, eisini í mun til matrikulmark og grannabygningar og herundir Tórsvøll, fyriliggja, ynskir tekniska fyrisitingin at viðgerða hesar.

Viðmerkingar frá Brunaumsjón Landsins eru ikki komnar.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar frá teknisku deild, og málsgongdina annars í málinum, har umsitingin í fleiri umførum hevur havt fund við umsøkjaran um loysn í málinum, og har umsitingin nágreiniliga hevur útgreinað krøv til, og umbiðið sær nøktandi tekningstilfar, mælir býararkitekturin til at nevndin heitir á umsøkjaran um at leita sær nøktandi ráðgeving og at venda aftur við nøktandi tekningstilfar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. oktober 2008**: Nevndin samtykti at ganga tí nýggju umsóknini á møti við treytum sum umsitingin setur.

**Ískoyti:**

Byggiloyvi er útskrivað 28. november 2008, í byggiloyvinum stendur m.a., at áðrenn bygningurin kann takast í nýtslu, skulu parkeringspláss verða gjørd við Gundadalshøllina, samsvarandi við støðumynd, dagfest 08.07.2005, seinast broytt 24.10.08, j.nr. 2007-3092/55.

Dansifrøi hava sent kommununi eitt skriv, dagfest 4. august 2009, har teir vísa til ein fund sama dag. Í skrivinum boða teir kommununi frá, at felagið ikki er ført fyri fíggjarliga at luttaka í arbeiðinum at gera parkeringspláss, og at hesin kostnaðurin ikki er tikin við í byggiætlanina.

**Dansifrøi søkja um:**
at omanfyri nevnda orðing í byggiloyvinum verður strikað og
at kommunan átekur sær at gjøgnumføra arbeiðið viðvíkjandi parkeringsplássinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at broyta treytirnar í byggiloyvinum og vísa samstundis á, at peningur ikki er avsettur til arbeiðið hvørki av rakstri ella íløgum til at kommunan kann átaka sær at gera arbeiðið og rinda fyri hetta.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2009:** Ein meiriluti: Bogi Andreasen, Halla Samuelsen og Levi Mørk taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jógvan Arge mælir til at málið verður beint í fíggjarnevndina at taka støðu til um kommunan skal átaka sær at gjøgnumføra arbeiði viðvíkjandi parkeringsplássinum við Gundadalshøllina.

Ein annar minniluti: Jan Christiansen mælir til at treytirnar um parkeringspláss verður strikað, vísandi til at nógv parkeringspláss eru í umhvørvinum og tí at fleiri aðrir bygningar eru gjørdir á staðnum uttan at parkeringspláss eru útvegað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstarardeildini mæla til at áleggja umsøkjaranum at lúka treytirnar í byggiloyvinum um parkeringspláss, ella at fylgja upprunaligu umsóknini/projektinum, og at parkeringsøkið verður gjørt liðugt, áðrenn byggivaldið gevur umøkjaranum nýtsluloyvi.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Samtykt at umsitingin lýsir málið nærri.

**Ískoyti:**
Hjálagt frágreiðing frá Dansifrøi viðv. parkeringsplássunum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2009:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Sjúrður Olsen mælir býráðnum til at átaka sær at gjøgnumføra arbeiðið viðv. parkeringsplássinum norðan fyri Gundadalshøllina í sambandi við heildarætlanina fyri Gundadal viðv. ferðslu- og parkeringsviðurskiftum.

Ein minniluti: Halla Samuelsen og Marin Katrina Frýdal vísa til samtyktirnar í byggi- og býarskipanarnevndina 31. august 2009 og í teknisku nevnd 3. september 2009.

**Býráðið 30. september 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

Atkvøddu fyri Heðin Mortensen, Bogi Andreassen, Jógvan Arge, Jákup S. Simonsen, Maria H. Olsen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen, Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu Marin K. Frýdal og Halla Samuelsen.

**Ískoyti:**
Í skrivi, dagfest 15. mars 2010, sigur Dansifrøi m.a., at nú felagshúsið er um at vera liðugt, er greitt, at kostnaðarmetingin uppá 9,5 mill.kr, sum varð gjørd í 2005, og sum stuöulin frá kommununi varð latin eftir, fer ikki at halda. Í skrivinum verður sagt: "Vit kunnu í dag staðfesta, at byggikostnaðurin verður 12.0 mill.kr. Ein hækking, sum felagið ikki er ført fyri at gjalda einsamalt. Vit loyva okkum tí við hesum at søkja kommununa um eisini at veita felagnum stuðul av hækkingini ella 60% av 2,5 mill.kr., í alt 1,5 mill. kr."

Býráðið samtykti í desember 2005 at játta 60%. Hetta var serstøk játtan, har kommunan tók á seg at lata tann stuðul, sum landið vanliga læt, tí væntandi var ikki, at landið játtaði nakran stuðul. Tá til stykkis kom, játtaði landið kortini kr. 1.767.000 ella 18,6% av upprunakostnaðarmetingini, sum var kr. 9.500.000 mió. Samlaði almenni stuðulin í mun til upprunakostnaðin er sostatt 78,6%.

Fortreytin hjá kommununi fyri at játta 60% heldur sostatt ikki heilt longur. Aðalregla fyri slíkum stuðulsmálum er harumframt, at stuðul verður latin við støði í kostnaðarmetingini , sum felagið sostatt hevur ábyrgd fyri at halda. Hóast at kommunan ikki letur meira stuðul, er samlaði almenni stuðulin til byggingina 62,225%.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til ikki at játta meira í stuðli til byggingina av felagshølunum hjá Dansifrøi, tí at stuðul verður latin sambært kostnaðarmetingini.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Meirilutin Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen og Annfinn Brekkstein samtykti at biðja umsitingina útvega nærri frágreiðing um hví byggingin er vorðin dýrari.

Minnilutin Maria Hammer Olsen og Halla Samuelsen taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 3. november 2010:** Kunnað varð um málið.

**Uppískoyti:**
Umsitingin hevur frá Dansifrøi fingið frágreiðing um, hví byggingin er vorðin dýrari. Arnfinnur Setberg, verkfrøðingur, hevur latið gera prísregulering og givið objektiva meting av byggingini sum heild.

Í frágreiðingini verður eisini víst á umstøður, sum hava verið við til at dýrka ætlanina. Her kunnu nevnast, at bygningurin er 20 fermetrar størri enn ætlað, at økið uttanum er størri, sum hevur havt við sær økt lendisfestingararbeiði og asfaltering, at myndugleikakrøv vórðu herd, og at kostnaðarmetingin hevði ikki allar byggiútreiðslur við, eitt nú liðuggerð uttanum v.m.

Sagt verður, at kostnaðarmetingin frá 2005 er gjørd á einum veikum projektgrundarlagi. Munurin millum kostnaðarmetingina frá 2005 og endaliga kostnaðin 2010 er knappar 2,4 mió kr., íroknað ein lønar- og tilfarshækking uppá umleið 1,2 mió kr. Niðurstøðan er, at talan er um bíligt byggjarí, har fermetraprísurin uttan mvg og uttan sjálvbodna arbeiði verður uml. 11.800 kr.

Dansifrøi søkir um 60% í stuðli av góðum 2,4 mió kr., t.e. uml. 1,5 mió kr.

Vísandi til tilmælið til síðsta mentamálanevndarfund, har kostnaðarmetingin er grundarlagið fyri stuðulsveitingini, ikki byggikostnaðurin, so eigur prísvøkstur eisini at verða roknað í kostnaðarmetingina. Tað er vanligt í øllum byggimálum, og metast má, at hetta er týðandi regla at halda seg til eisini í mun til framtíðar stuðulsmál.

Við at taka prísvøksturin burturúr samlaðu kostnaðarmetingini, so sær roknistykkið soleiðis út: Kostnaðarøking 2.398 tkr. minus prísvøkstur 1.164 tkr. = 1.234 tkr. 60% av tí er 740 tkr.

Játtan er ikki tøk til endamálið á kontuni 5370 Stuðul til íløgur. Møguleiki er at fíggja upphæddina yvir lidnar ella lokaðar verkætlanir j. nr. 2010-2717. Meirstuðulin er at rokna sum endaligur frá kommununi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 740.000 kr. í stuðli aftrat, og at tað verður fíggjað frá lidnum verkætlanum soleiðis: av § 3 528.000 kr., av § 4 146.000 kr., og av § 5 66.000.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**204/10** **2007-0625**

**Eysturskúlin – høvuðsumvæling**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Húsaumsitingin er farin í holt við at umvæla Eysturskúlan. A og B lonurnar eru gjørdar, og nú vanta C, D og E lonirnar.

Húsaumsitingin saman við arkitektinum hava verið á fundi við leiðsluna í skúlanum fyrr í ár. Leiðslan ynskti at E lonin varð gjørd fyrst, tí tey mettu hesa verða mest átroðkandi. Nøkur vindeygu eru skrúvaðið føst fyri ikki at detta úr. Havandi í huga at hesi eisini virka sum fluktvegir út á takið, er skilagott at gera hetta arbeiðið fyrst.
Sambært fyribils kostnaðarmeting verður hetta arbeiðið mett at koma at kosta uml.10 mill. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir arbeiðið á E-lonina. Hetta merkir, at aftrat teimum 5 mill. kr,. sum Húsaumsitingin hevur sett av til Eysturskúlan í ár, verður neyðugt at kunna seta 5 mill. kr. av játtanina til konto 82 í komandi ár til Eysturskúlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Húsaumsitingin hevur heitt á ráðgevan A3 v/Hans Dávid Dam, ark. og biðið hann gera útbjóðingartilfarið fyri C lonina umframt tekjurnar, sum leiðslan ynskti (ikki E lonin hetta er ein misskiljing).

Innboðin lisitatión varð hildin og inn komu 3 tilboð. Tilboðini lógu upp á 12,9, 14,3 og 17,7 mió. kr. Lægstur við kr 12.938.329,00 lá Sp/f Karstin A.Joensen, byggimeistari í Kollafirði. Meting okkara var 12.027.035 mió. kr.

Fyri lítlum ári síðani fingu vit samlað tilboð frá spf ÁTS fyri bygningspartarnar C, D og E, og var hettar upp 20,9 mió. kr. - Fyri bygningspart C + tekjurnar, skuldi hettar givið kr. 12,6 mió. kr.

Ráðgevin hevur mælt til at taka av lægsta tilboðnum. Umsitingin hevur gjørt samlaða kostnaðarmeting, íroknað ókent, prístalsreguleringar, prosjekt, eftirlit og byggileiðsla og mvg, og er samlaði kostnaðurin mettur at blíva kr. 16.633.839,22, (skjal 2007-0625/4).

Upprunaliga varð roknað við at játtanin til hetta arbeiði skuldi verða av konto 82, umsiting av bygningum. Men í samband við fíggjarætlan fyri 2008 var avgjørt at talan var ikki um vanligt viðlíkahald, men heldur um eina íløgu í dagføring, og var tí avgjørt at játtanin fyri 2008 til hetta arbeiði skal av íløgum fyri 2008.

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum, og at játtaðar verða kr. 16.633.839,22 av íløgum fyri 2008, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2007:** Útsett.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tilboðið, sum víst verður til í tilmælinum omanfyri, verður fíggjað av íløgum fyri 2008 kr. 13.785.000,00, restupphæddin kr. 2.848.839,22 verða goldnar av konto 82, umsiting av bygningum, skúlamál.

**Mentamálanevndin 2. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 13.785.000,00 av íløgum fyri 2008.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**

C lonin í Eysturskúlanum var liðugt høvuðsumvæld í 2008, sostatt eru A, B og C lonirnar umvældar.

Tá umvælingin av C lonini var liðug, varð í samráð við skúlan avgjørt at bíða eina tíð við framhaldandi umvælingunum, tí skúlin metti, at høvuðsumvælingin órógvar dagliga arbeiðið í skúlanum so mikið, at tørvur var á einum steðgi í eini tvey ár.

Tann tíðin er farin nú, og mælt verður tí til, at høvuðsumvælingin verður tikin upp aftur, og at farið verður í gongd við D lonina.

Ráðgevin metir, at kostnaðurin fyri projekteringina er 314.000 kr. uttan mvg. Við mvg og við at leggja nakað aftrat til óvæntað, verður metti kostnaðurin fyri at projektera liðugt og gera klárt til útboð 370.000 kr.

Gerast skal ein ráðgevarasáttmáli um projektering og eftirlit við høvuðsumvælingini. Ráðgevin, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar

vórðu umvældar, hevur neyva vitan um bygningin og verkætlanina sum heild, og tí verður viðmælt, at heimild verður givin at gera sáttmála við hann aftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at heimild verður givin at gera sáttmála við ráðgevan, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar vórðu umvældar.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at 370.000 kr. verða játtaðar av konto 4175, Dagføring av skúlum, til projektering av høvuðsumvæling av D lonini í Eysturskúlanum, soleiðis at hetta umvælingarstigið kann bjóðast út.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. 370.000 av íløguætlanini fyri 2011.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**205/10** **2010-2775**

**Støðutakan til tilmæli um innkomin tilboð í sambandi við útbjóðing av innbúgvi til Skúlan á Argjahamri**

**Lýsing av málinum - samandráttur**
Í sambandi við bygging av nýggjum skúla á Argjahamri varð avrátt at bjóða innbúgvið út til útvaldar veitarar. Tórshavnar kommuna valdi 6 veitarar at koma við tilboði. Útbjóðingartilfarið var tøkt 24.09.2010.
Tilboðini vórðu latin upp tann 21.10.10. kl 14. 5 tilboð komu inn; Idé møblar lótu ikki tilboð inn. Úrslitið var:
Allar upphæddir í kr., uttan mvg.

| **Veitari:** | **Leyst innbúgv** | **Serinnbúgv** | **Leyst og serinnbúgv** |
|---|---|---|---|
| **Nema:** | 3.511.768 | 2.671.669 | 6.133.437 |
| **Byggitilfar:** | 3.567.510 | 3.115.798 | 6.683.309 |
| **Blika:** | 3.738.348 | 2.816.517 | 6.554.865 |
| **Eikin:** | 4.581.815 | 2.911.393 | 7.493.208 |
| **Inventartæn:** | 4.854.392 | Einki boð | Einki boð |

**Viðgerð:**
Heitt var á MAP (Eyðun Eliasen og Ann Fuglø (serinnbúgv)) og RÚM (Sverri Heinesen) um at gjøgnumganga tilboðini og gera tilmæli. Umboð fyri Tórshavnar

kommunu og Argja skúla eru kunnað so hvørt í viðgerðartíðini. Hugt varð eftir prísi, dygd og sniði.

**Leyst nnbúgv:**
Útbjóðingin var, eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu, skipað soleiðis, at tað er latið upp í hendurnar á veitarunum, sjálvar at velja tær vørur, ið luku fyriskrivingarnar í útbjóðingartilfarinum. Ein vøra var tó undantikin. Tað var næmingastólurin. Tað var mett, at næmingastólurin var so týdningarmikil í skúlanum, at hann skuldi vera bundin. Eftir at hava kannað fleiri stólar, var brúkarin á einum máli um at peika á "Surf-stólin" sum næmingastól. Hóast tilboðsgevararnir ynsktu at sleppa undan bindingini, varð tað gjørt veitarunum púra greitt, at tilboðið skuldi vera við "Surf-stólinum", men at veitararnir høvdu møguleika at koma við alternativum boðum uppá annan stól.

Fyrsta niðurstøðan var, at mælt varð til at hyggja nærri eftir tilboðunum frá Nema og Byggitilfar.

**Alment um meting av tilboðum**
Leisturin at lata veitaran velja vørurnar ger, at tað ikki kann gerast ein beinleiðis samanbering. MAP og Rúm hava samanborið útvaldar vørur, sum metast at hava stóran týdning fyri brúkið á skúlanum, dygd, prís og snið.

Tilboðini eru lýst gjølla, serliga har tað hava verið eyðsýnd frávik. Í summum førum hava veitararnir fingið møguleika at viðmerkja. Tað skal tó gerast vart við, at veitararnir kenna tilboðsupphæddina hjá hvørjum øðrum, og eru fyrispurningar um prísir óivað merktir av hesum. Samlaði prísurin kann fara báðar vegir, og kann hetta tí ikki liggja til grund fyri einari endaligari avgerð. Ráðgevarnir meta, at Byggitilfar hevur betri veiting, tá tað kemur til næmingastólar, næmingaborð, arbeiðsborð, skáp og hillar. Nema hevur betri veiting, tá tað kemur til bleytar møblar, diskar, bókasavnsreolir og garderobur.

Ráðgevarnir eru av tí fatan, at sum heild passar innbúgvið hjá Byggitilfar betur til byggilistina og stimbrar næmingarnar betur enn innbúgvið hjá Nema.

Veitingarnar hjá báðum kunnu góðtakast, tá hugsað verður um dygd, við undantak av stólinum, sum biðið verður tilboð uppá.

Sum fyrr nevnt, varð kravt, at allir veitarar skuldu geva tilboð uppá "Surf-stólin", men at veitararnir kundu koma við alternativum tilboðum. Eftir at tilboðini vóru latin upp, kundi staðfestast, at Nema ikki hevði givið tilboð uppá stólin, sum biðið var um. Tilboð er givið uppá annan stól, sum líktist. Setrið er tað sama, men undirstellið eitt annað. At Nema ikki gevur tilboð uppá tann sama stólin, sum allir hinir veitarnir, hevur eisini ørkymlað viðgerðina. Tað kann staðfestast munur í tilfari og útsjónd á undirstellinum. Stólurin frá Byggitilfar verður mettur at vera tann betri til skúlan.

Nema hevur í sínum tilboði harumframt ikki allar stólarnar í tí fyriskrivaðu støddini. Ein triðingur er í minni stødd.

Verða tilboðini samanborin, uttan stólin, er tilboðið frá Byggitilfar tilsamans 76.000 kr. bíligari.

**Tilmæli (leyst innbúgv)**:
Mælt verður til at taka upp samráðingar við Byggitilfar um veiting av leysum innbúgvi til Skúlan á Argjahamri, og at umsitingin fær heimild at samráðast um smærri tillagingar.

**Serinnbúgv:**
Viðurskiftini við serinnbúgvinum er øðrvísi enn við tí leysa innbúgvinum. Útbjóðingartilfarið er neyvt lýst við støddum, skapi og kravsetingum. Tí ber til at sammeta veitingarnar og prísirnar á innkomnu tilboðum beinleiðis. Nema er 145.000 kr bíligari enn næstlægsta tilboð.

Nevnast kann at tilboðið frá Nema er sama vøra sum serinnbúgvið í skúlanum við Løgmannabreyt.

**Tilmæli (serinnbúgv)**:
Mælt verður til at taka av tilboðnum frá Nema, og at fara undir samráðingar um sáttmála um veiting av serinnbúgvi til Skúlan á Argjahamri.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálnevndini til at taka undir við omanfyri nevndu tilmælum.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**206/10** **2006-1053**

**Alment wc í Kirkjubø**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 27. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 21. mai 2007:** Heitt verður á Tórshavnar

kommunu um at seta pening av til almenn wc í Kirkjubø og rakstur.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir spyrja eftir status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 15. oktober 2007:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

Higartil er ikki peningur settur av til verkætlanina. Søkt er um játtan í 2008 til slíkar íløgur.

- Tekniska nevndin skal taka støðu til umbønina frá staðbundnu nevndini.

**Tekniska nevnd 17. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við áheitanini frá staðbundnu nevndini og at gera uppskot til staðseting og søkja avvarðandi myndugleikar um loyvi.

Staðbundnu limirnir spyrja eftir status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 5. mars 2008:** Kunnað varð um málið. Arbeitt verður við at fáa neyðug loyvir til vega, men játtan er ikki sett av til hetta arbeiðið í íløgum. Møguliga kann hetta fíggjast um raksturin.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 26. mai 2008:** Heitt verður á Tórshavnar kommunu um at arbeiða við eini loysn.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir biðja um status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 22. oktober 2008:** Tóri í Hoyvík kunnaði um málið. Málið er hjá Fornminnismyndugleikanum.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir ynskja at verða kunnaðir um heildarætlanina frá fornminnismyndugleikanum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 9. desember 2008:** Svar er ikki komið frá Fornminnismyndugleikunum enn.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur í skrivi frá Føroya Fornminnissavni, dagf. 17.12.2008, fingið upplýst, at sambært áliti um heildarætlan fyri varðveitingini av fornminnum í Kirkubø, verður mælt ikki til at gera viðskiftahús, áðrenn politisk støða er tikin til tilmælið. Umsitingin kunnar annars um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 14. mai 2009:** Leiðarin á lendisdeildini kunnaði um status í málinum. Nevndin samtykti at beina málið í byggi-og býarskipanarnevndina til endaliga staðseting av viðskiftahúsinum(almennum wc og buss-skýli).

**Ískoyti:**
3 uppskot eru í umboði, viðv. staðseting av viðskiftahúsi (alment wc og bussskýli). Umsitingin mælir til 3 møguleikar á trimum økjum, liggjandi í økinum H. Økið er lagt av til frílendi, úthús líknandi bygning til tænastur, men ikki íbúðarbygning.

Økini liggja á matrikkul nummar 8a (A). Vit mæla ti, at hetta økið er best egnað. Næstbest egnað er 10a (B). Triðja best egnaða økið er 20 C (C). Sí ávikavist niðanfyri, og hjáløgdu tekning:

| | |
|---|---|
| A.8a | Ognarviðurskifti: Búnaðargrunnurin fyrr (Føroya Jarðargrunnur) samb. Dóm 30.09.1999. Sí tekning: Uppskot til viðskiftahús í Kirkjubø, 09.01.1999, J.P. Gregoriussen & U. Patursson |
| B. 10a | Útbygging av kaffistovu. Gjøllari kanningar eru neyðugar |
| C. 20 c | Ognarviðurskifti Tórshavnar kommuna. |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at velja uppskot A.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd.

- Kunnað verður um status.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Kunnað varð um málið.

- Formaðurin í teknisku nevnd ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 14. januar 2010:** Nevndin samtykti at heita á borgarstjóran um at taka málið upp við viðkomandi landsstýrisfólk, við støði í skrivi frá Føroya Fornminnissavni (j. nr: 2006-1053/13), vísandi til týdningin av at hava nøktandi umstøður í sambandi við ferðavinnuna og vitjandi annars. Nevndin ynskir at nýtt alment wc er uppsett áðrenn summar 2010.

Sjúrður Olsen farin av fundi.

Vísandi til skriv frá Sølvá Paturson, j nr 2006-1053/18, staðfestir nevndin, at wc verður tikið burtur áðrenn summar 2010.

- Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Málið útsett.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 18. januar 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um støðuna, eftir at borgarstjórin hevur havt fund við landsstýriskvinnuna mikudagin 3. mars 2010. Umsitingin skal eisini vísa á, at ongin játtan er avsett í fíggjarætlanini til viðskiftahús í Kirkjubø, og at játtan má fáast til vega, áðrenn projektering og bygging verða sett í verk.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Málið útsett, tí at fundurin millum borgarstjóran og landsstýriskvinnuna varð útsettur.

**Ískoyti:**
Fundurin við landsstýriskvinnuna hin 3. mars 2010 var avlýstur av landsstýriskvinnuni.

Umsitingin hevur eisini havt samskifti við Føroya Fornminnissavn um málið. Í skrivi móttikið 30. mars 2010 svarar Fornminnissavnið, soleiðis:

> Við tað, at tær tænastur, viðskiftahúsið er ætlað til, eru alneyðugar, metir Fornminnissavnið tað verða skilabest at fremja uppskotið, ið fyriliggur. Hetta tó við tí fyrivarni, at talan er um eina fyribils loysn, av tí at nevndu tænastur fara at verða tiknar við í oman fyri nevndu yvirordnaðu økisskipanina. Vert er at gera vart við, at henda økisskipan fer at verða Tá hon fyriliggur, kann henda, at funnin verður onnur loysn á hesum tænastum, ið sampakkar við eina heild. Tá farið verður undir at fremja ætlanina til viðskiftahús eigur kommunan tí at hava hetta í huga.

Við hesi treytaðu tilsøgn ber nú sostatt til at seta eina fyribils loysn í verk. Leysliga mett vil ein detailprojektering kosta uml. kr. 150.000,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin vísa til ískoyti til fundin í teknisku nevnd 4. mars 2010, um manglandi fígging, sum nevndin má útvega áðrenn projektering og bygging verða sett í verk, og til treytaðu tilsøgnina frá Fornminnissavninum um eina fyribils loysn.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, álj. kr. 150.000,-, til at fremja omanfyri nevndu detailprojektering.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at biðja um tilboð uppá detailprojektering við støði í fyriliggjandi uppskoti. Tilboðið verður at leggja fyri fíggjarnevndina á fyrstkomandi fundi.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 26. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at beina málið í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommunar.

**Tekniska nevnd 23. september 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at beina málið í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommununar.

**Fíggjarnevndin 6. oktober 2010:** Málið útsett til nærri kanningar og at leggja fyri fíggjarnevndin aftur á fyrstkomandi fundi.

**Fíggjarnevndin 17.november 2010:** Tekniski stjóri kunnaði um málið. Málið verður tikið upp í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við leiðsluna á Tekniska skúla, um at fáa í lag eitt samstarv við skúlan um bygging av viðskiftahúsi í Kirkjubø. Skúlin er sera áhugaður í at luttaka í eini slíkari verkætlan, sum skúlin so eisini vil nýta í síni undirvísing fyrra hálvár 2011. Skúlin hevur luttikið í líknandi verkætlanum fyrr – eitt nú í Koltri og á Dímun. Skúlin ynskir tó ikki at standa fyri byggiarbeiðinum, men at okkurt byggivirki stendur fyri hesum, meðan næmingar skúlans luttaka sum arbeiðsmegi í sambandi við byggingina. Skúlin skal ikki hava løn til næmingarnar fyri sína luttøku, men hevur eitt ynski um, at kommunan kann veita ein stuðul til eitt nú lestrarferð hjá næmingum.

Umsitingin hevur viðgjørt ynskini hjá Tekniska skúla, og sær ikki nakran trupulleika í at arbeiðið verður gjørt eftir tí leisti, sum skúlin mælir til. Umsitingin mælir til, at tilboð verða umbiðin frá byggivirkjum uppá byggibúningararbeiði, og at sama virki eisini stendur fyri sjálvum byggiarbeiðinum, við hjálp frá næmingum á Tekniska skúla, sum eisini ger elementir o.a. bygningslutir.

Verætlanin verður fíggjað av avlopi frá lidnum verkætlanum, har avsettar eru kr. 1,0 mió. til verkætlanina, (sí j. nr. 2010-2717).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til:

1. at heita á fíggjarnevndina um at taka upp samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av neyðugum undirlendi til viðskiftahúsið
2. at heimila umsitingini at lata upp í hendi á ráðgeva at gera byggibúningarprosjekt v.m.
3. at heimila umsitingini at gera avtalu við Tekniska skúla um, at teir prosjektera bygningin sum ein timbur-element bygning og gera neyðugu bygningslutirnar í hesum sambandi
4. at kommunan rindar fyri tilfar, ið Tekniski skúlin nýtir til verkætlanina
5. at heimila umsitingini at bjóða byggibúningararbeiðið v.m. út sum undirhondsboð so skjótt avtala er gjørd um undirlendið.

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til góðkenningar.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta 1,0 mió. kr. til verkætlanina av lokaðum verkætlanum fyri 2010 (j.nr. 2010-2717).

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 13. desember 2010:** Kunnað varð um málið.

Nevndin vísti á manglar: Handikap wc og skiftirúm til smábørn o.o. Biðið verður um at síggja endaliga tekning, áðrenn byggingin byrjar.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**207/10** **<u>2010-1161</u>**

**<u>Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2010</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri apríl 2010 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai, juni, juli og august 2010 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 9. september 2010:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september 2010 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17.november 2010:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 25. november 2010:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober 2010 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt góðkent.

**208/10** **2010-0547**

**Játtanarreglur í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2010.**

Umsitingin hevur gjørt uppskot til dagføring av reglunum

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Mælt verður býráðnum til at góðkenna uppskotið til dagførdar játtanarreglur við teirri broyting, at setningurin "*Undantikið er árliga játtanin til kloakkir, sum fellur aftur til høvuðskontuna fyri íløgur í kloakkir*" í uppskotinum verður strikaður.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**209/10** **2010-2719**

**Umbøn um at flyta minninýtsluna fyri 2010 á konto 2743 Heilræði til 2011.**

Fyri árið 2010 verður væntandi ein minninýtsla í mun til játtanina hjá Heilræði á um leið 100.000,- kr. Lønin hjá ergoterapeutinum í Heilræði verður í stóran mun fíggjað við egingjaldi fyri venjingarnar. Henda inntøka kann vera skiftandi, alt eftir hvussu nógv melda seg til venjingarnar.

Sambært galdandi játtanarskipan kann meir- ella minninýtsla hjá Heilræði ikki flytast fram. Fyri stovnin hevði tað verið ein fyrimunur, um møgulig minni- ella meirnýtsla av sær sjálvum varð framflutt á hvørjum ári.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at minninýtsla fyri 2010 verður framflutt til 2011.

**Sosiala nevnd 7. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**210/10** **<u>2010-2731</u>**

**<u>Ásetan av fundardøgum býráðsins fyri 2011</u>**

Uppskot frá umsitingini til fundardagar:

| | | |
|---|---|---|
| 27. januar | 08. september | |
| 24. februar | 29. september | fíggjarætlan |
| 24. mars | 20. oktober | |
| 14. apríl | 27. oktober | fíggjarætlan |
| 18. mai | 24. november | |
| 26. mai | 14. desember | |
| 16. juni | | |

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**211/10** **<u>2010-2867</u>**

**<u>Fíggjarætlan og framtíðin hjá felagsskapinum SEV</u>**

Marin Katrina Frýdal biður um málið á skrá

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Marin Katrina Frýdal kunnaði um málið.

**Ískoyti**
Marin Katrina Frýdal biður um, at býráðið tekur støðu til fíggjarætlanina hjá SEV fyri 2011.

**Býráðið 16. desember 2010:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Heðin Mortensen, um at taka málið av skrá, varð samtykt við 5 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge og Jákup Símun Simonsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:50**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria H. Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |